## Frítíðarløn 2. mai 2004

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2004.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Hevur tú flutt bústað, síðani tú seinast boðaði fólkayvirlitinum frá,** fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.

Fyri at sleppa undan hesum heitir Frítíðargrunnurin vinarliga á tey, **sum eru búsitandi í Føroyum** um at fráboða fólkayvirlitinum nýggja bústaðin.

**Frítíðarlønin fyri 2004 fer inn á somu kontu sum í fjør.** Um tú ynskir hetta kontunummar broytt, verður tú biðin um at fráboða okkum nýggja kontunummarið.

Tú kanst upplýsa okkum um broytta kontunummarið við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana **áðrenn 14. apríl 2004.**

Eisini ber til at fara inn á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo og útfylla oyðublaðið um frítíðarløn.

Spurningar kunnu svarast á telefon 37 10 51.
Telefonin svarar mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

____________ , / 2004 ____________________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast til: Toll- og Skattstovu Føroya
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri

## Partabræv

til sølu fyri hægstbjóðandi.

**Tlf. 777211**

## Ársaðalfundur

Aðalfundur Tvøroyrar Handverkarafelags verður í húsum felagsins leygardagin 27. mars 2004, kl. 19.00.

Skrá: Sambært §24 í lóg felagsins.

**Nevndin**




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3738
**Navn:** Sp/f BJ-Holding
**Adressa:** Niðaragøta 40, P.Box 249, 110 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 08.03.2004
**Viðtøkudato:** 08.03.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 kontant til kurs 100.
**Stovnari:** Billy Hansen, 470 Eiði.
**Stjórn:** Billy Hansen, 470 Eiði.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Rokskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta rokskaparár:** 08.03.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita fylgisveinatænastur og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 10. februar 2004*

*Kristin Balle*




### Aftur í ár ger Sosialurin tað vælumtókta fótbóltsblaðið

Sosialurin er við frá byrjan, tá fótbólturin fer á rull miðskeiðis í mars mánaði. Blaðið hevur seinastu mongu árini havt umfatandi umrøðu av fótbóltskappingini, og soleiðis verður aftur í ár. Vit markera byrjanina av nýggja fótbóltsárinum við einum stórum og vækrum eykablaði – Fótbóltur 2004.

Í blaðnum verður støðan gjørd upp, nú feløgini fara at jagstra gull og heiður. Vit greiða frá, hvussu feløgini eru fyri og vit tosað við leikarar og venjarar kring landið. Høvuðsdentur verður lagdur á bestu mandsdeildina, men eisini 2. deild, kvinnurnar, útisetar og landsliðið fáa innivist í blaðnum.

Samlaða upplagið verður um 11.000. Blaðið verður á útgávudegnum latið øllum teimum, sum keypa ella halda Sosialin, umframt at blaðið eisini fer at liggja frammi í leysasølu.

**Lesið internet Sosialin !**




### Heimarøktin í Suðurstreymoy

## Summarfrítíðar-avloysarar

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2004 at arbeiða í Heimarøktini í skiftandi vaktum og 3. hvørt vikuskifti.

Heimarøktin veitir tænastur dagliga millum kl. 8.30 og 23.30

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 31 72 49 kl. 9-11

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum fíggjamálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avritið av prógvum og upplýsingum um arbeiðsroyndir og upplýsingum um ynskiligar arbeiðstíðir skulu stílast og sendast til.

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att. Økisleiðarin Anna Maria Oskarsson
Skálatrøð 14,
Fo-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 29. mars 2004



## Kunngerð
### um broyting av Bygdarplaninum fyri Oyndarfjarðar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at bygdarráðið á fundi 09/03-04 hevur viðtikið at gera broytingar í bygdarplaninum í Oyndarfirði.

Broytingin umfatar nýtt E-øki á J-øki vestan- og sunnarfyri Oyndarfjarðar skúla og umfatar broytingin hesar matriklar:

**Matr. nr. 14ª, matr. nr. 66 og matr nr. 139 Oyndarfjarðar bygd.**

Broytingarnar eru til skjals í Gamla skúla mánadagfríggjadag frá kl. 8.00-21.00 frá 12. mars til og við 2. apríl 2004.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2004.

Oyndarfjørður, tann 10/03-2004

**Oyndarfjarðar bygdarráð**

**Skeiðsdepilin** FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

### Stórur vøkstur í leiðaraútbúgvingum

Diplomleiðara-, Grundleggjandi leiðara-, og Projektleiðaraútbúgvingar byrjaðu í 2003 við 4 holdum, hvørt við 18 luttakarum.

Fyrra hálvár 2004 byrja nýggj hold og **nøkur pláss eru eftir á:**

- **Diplomleiðaraútbúgving, 40 dagar yvir 2 ár byrjar 22. mars 2004**
- **Projektleiðaraútbúgving, 6 dagar yvir 3 mðr. byrjar 21. apríl 2004**

**Tilmelding skjótast til Skeiðsdepilin á tel 31 88 13**

Lesið meira um útbúgvingarnar á **www.skeidsdepilin.fo**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

team85 • 358000




## Haldarar hjá Sosialinum

ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

**Prentmiðstøðin**

## Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir 3 farmakonomnæmingum, at byrja 3. mai 2004.

Eitt læruupláss er á Eysturoyar Apotek og hini bæði á Tjaldurs Apotek.

Ert tú áhugað/ur at nema tær útbúgving innan apotek, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:
Læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum, hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært galdandi lógum og kunngerðum.

Læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í sambandi við útflýggjan av apotekaravørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram á Eysturoyar apoteki í Runavík og Tjaldurs apoteki í Tórshavn, í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød í Danmark. Næmingurin skal í skúla 1-4 vikur í senn, ílt 7 ferðir í lærutíðini. Próvtøka er á skúlanum á 2. og 3. ári.

Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
110 Tórshavn

áðrenn 16. apríl 2004.

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja
**mánadagin 15. marts**
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss
og **týsdagin 16. marts**
kl. 19.30 til motorsúkklu

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi e.l. til havnadeildina hjá stovninum. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:
- Hevur hald og rakstur av havnum og lendingum um hendi
- Fysisk planlegging á sjónum
- Programmeringar, forkanningar og prosjektgransking
- Fakeftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella líknandi - helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum. Harafturat kundu vit hugsað okkum, at umsøkjarin hevur edv kunnleika viðv. perl scripting, dátugrunni, dynamiskari heimasíðu og hagfrøðiligari dátuviðgerð. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til havnadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 31 13 33, lokal 316, (e-postur: ewald@lv.fo) ella fartel. 540 861.

## Fólk til eykaluta-goymslu



Søkt verður eftir fólki til eykalutagoymslu okkara, at byrja sum skjótast. Fa. Billutir er ein fyritøka, sum selir eykalutir til flest allar bilar. Vit kundu hugsa okkum, at tann sum verður settur í starv, er álitandi, kundavinarligur, hevur áhuga fyri bilum, koyrikort og teludkunnleika á brúkarastøði.

Løn og arbeiðstíð eftir avtalu.

Umsóknir skulu sendast til okkara innan 20. mars.

**Fa. Billutir**
Postboks 1 · 410 Kollafjørður
Tlf. 421605 ella 210095